

*Hetta munnu vera nakrir fiskimenn, sum eru farnir til fotograf.* ***Uttast t.v.*** *eru tað Johan og Jóannes av Eiði, síðan Dánjal og Mikkjal á Trøðni, beiggi Heina á Trøðni í Havn*



*Tað var við Slatrinum, at syrgiliga vanlukkan hendi í 1930*



*Dánjal sigldi nógv við Marshall, sum seinni fór til Vágs*



*Hvalastøðin á Gjánoyri, har Dánjal arbeiddi eitt ár*

hevði fingið lungnabruna og var innløgd at fyribirgja tuberklar, men hon kom skjótt heim aftur. Poulina, systir Dánjal, tók sær av børnunum og húsinum, meðan Inga var sjúk.

Úrtøkan í Canada var 45 dollarar um mánaðin, og Dánjal fekk livrapengarnar afturat sum kokkaviðbót. Hetta var ein hampuliga góð inntøka eftir tátíðini. Inga kom fyri seg aftur, og tey fóru bæði til Havnar og keyptu sær ymiskt, sum tey kundu hugsa sær til húsini. Millum hetta var ein málningur av Kristin í Geil.

Tey høvdu keypt sær grønar plússmøblar og annað, ið hoyrdi stovuni til, tá ið tey fluttu í húsini. Tey høvdu eitt sera hugnaligt heim uppi á Hvítanesi.

Berint bygdi eisini á Hvítanesi. Tey høvdu eisini eitt vakurt heim. Tey vóru barnleys, men tey fostraðu upp Elinu, dóttir Mallu, systir Poulinu. Berint og Poulina livdu ikki leingi. Berint var kendur sum ein góður trolmaður. Hann hevði eisini handil á Hvítanesi og tók ímóti fiski.

## Vildu rógva skipið til lands

Í 1916 fer Dánjal við Haffarinum, sum Jóan Jakku á Viðareiði keypti í 1913 úr Reykjavík, og sum hann eisini førdi. Teir fiskaðu 300 skippund og fóru inn í Reykjavík, áðrenn teir fóru heim. Har segði ein norskur umboðsmaður, Ellingsen, fyri teimum, at teir fingu nógv meira fyri fiskin í Noregi. Tískil fóru teir til Ålesund við fiskinum. Tá ið teir nærkaðust norsku strondini stilti av, og teir fóru í bátin og ætlaðu at sleipa skipið, men Berint tók so nógv á, at árin brotnaði. So gjørdist einki, tí teir høvdu ikki fleiri árar. Teir preijaðu so ein útróðrarbát, sum kom framvið og spurdu, hvat teir tóku fyri at sleipa teir inn. 500 kr. var svarið. Tað var virðið av einum lýsifati tá. Hetta ljóðar nógv, men lýsi var nógv eftirspurt undir kríngnum.

Tá ið hann hevði sleipað teir nakað, kom vindur, so sigldu teir sjálvir inn til Ålesund. Hinir høvdu fingið sínar 500 krónur. Teir fingu at vita, at teir høvdu verið hepnir, tí har hevði ligið eitt týskt vaktarskip at forða skipum at koma inn til Ålesund. Tað var júst farið avstað kvøldið fyri, teir komu. Kanska var skipið farið at luttaka í einum stórum sjóslagi, sum leikaði millum týskarar og bretar. Tað varð sagt, at hetta var størsta sjóslag í søguni.

Haffarið kom heim aftur í øllum góðum, og Dánjal segði, at túrurin var ein góð uppliving og ein góður túrur, hvat inntøku viðvíkir.

Jóan Jakku seldi Haffarið í 1922 til Marionnu Nielsen í Vestmanna. Skipið fórst í 1943 við Orknoyggjarnar, men manningin varð bjargað.

## Aftur við Marshall

Í 1917 fór Dánjal til Íslands við Marshall, men veðrið var ógvuliga ringt hetta árið. Tað var havt á munni um tær ringu páskirnar, tá ið teir róku aftur til Føroyar. Skipið fór illa í hesu ringa veðrinum. Báturin var brotnaður. Seglið skrædnaði, og skuldi klyvarin fáast upp aftur, mátti onkur fara fram á sprytið at festa ein boyla, sum var farin framav. Hetta var ikki nøkur lætt uppgáva, tí skipið var alt avísað, og tað var sprytið eisini. Dánjal helt seg til at royna, og tað eydnaðist honum at festa hendan boylan í. Onkur annar fortaldi fyri mær, at tá ið Dánjal var aftur á dekkinum í øllum góðum, tá skuldu Niklas í Kunoy siga, "um mær var lovað alla Kallsoynna afturfyri, hevði eg ikki gjørt tað." Vit kunnu hugsa okkum, at umstøðurnar hava ikki verið góðar. So fingu teir heysa klyvaran og sigldu heim.

Dánjal segði skiparanum, at hann fór heim at vára heldur enn at fara á Føroya Banka, ið týskararnir høvdu lýst sum vandaøki. Hetta helt skiparin Palli á Lava ikki hava so nógv at týða, men hann fór so á Fugloyarbankan í staðin fyri. Sostatt var Marshall ikki á Føroya Banka, tá ið fleiri sluppir vórðu søktar. Tíbetur kláraðu allar manningarnar á hesum skipum at rógva til lands í teirra smáu vánaligu bátum, tí veðrið var av tí besta. At eingin mannskaði hendi á hesum søktu skipum var hildið at vera eitt Guds undur. Eftir hetta varð trygdin herd á skipunum, og krøv vórðu sett til bjargingarbátarnar.

Dánjal fór aftur við Marshall í 1918, og hetta var eitt toluligt ár. Hann hevði sum kokkur fasta løn og kundi fiska eitt sindur afturat. Skiparan Palla á Lava hevur Dánjal bara rósandi orð um. Hann hevði gott skil á øllum umborð.

Palli á Lava fekk ikki eitt langt lív. Í 1919 keypti hann saman við Karl á Lag Puritan úr Svøríki. Teir fóru niður til Fletwood at landa veiðuna, og á vegnum aftur til Føroya forlistu teir. Seks av átta monnum umborð doyðu. Millum hesar vóru Palli og sonur hansara Jákup.

Tveir mans skolaðu uppá eina oyggj, har teir vóru í tvey samdøgur, til teir vórðu bjargaðir.

## Bar 100 punds kalva úr Havn til Hvítanesar

Hans í Funningsstovu kom í 1919 niðan á Hvítanes at biðja Dánjal til kokk við C. M. Slater, vanliga kallað Slatrið. Hann skuldi fáa 100 kr eyka, kom hann við.

Komnir út á bankan var meira linligt. Fleiri vóru í koyggjuni og høvdu sjóverk sum vanligt var, tá ið túrur byrjar. Dánjal fór upp á dekkið og kastar